



# SMS – ein heildaruppliving



**Fyrireikingin til jólini byrjar í SMS, langt áðrenn fólk vanliga eru farin at hugsa um jól.**

Eitt kent slogan hjá handilsmiðstøðini á Trapputrøðni er "SMS – ein býlingur í Havn". Tann sum stjórnar hesum býlingi er Bogi Andreasen, sum er býlingsstjóri í SMS.

Bogi sigur, at tað er nógv at hugsa um hjá teimum. Jólabýurin skal koma upp á pláss, og øll tiltøkini í jólamáðinum skulu samskipast. Eisini skal haldast skil á ferðsluni á parkeringsøkinum rundan um handilsbygningin.

SMS skal vera ein upplivingardepil, sigur Bogi sum leggur dent á at handilsmiðstøðin skal vera nakað fyri alla familjuna. Fólk skulu kunna koma í SMS og hugna sær við t.d. at vitja teir ymisku handlarnar og matstovurnar, eins og ein framsýning ella okkurt til undirhalds skal verða á Torginum.

Torgið er miðpunktið í SMS sigur Bogi. Har eru altíð nógv ymisk tiltøk sum t.d. kórsangur, tónleikaframførslur og framsýningar. Hesa tíðina draga jólabýurin og jólamenninir nógv fólk til sín. Bogi sigur, at tey sum kundu hugsað sær at havt okkurt tiltak á Torginum eru vælkomin at kontakta seg á mailadressuni: bogi@sms.fo

Býlingsstjórin í SMS bjóðar øllum at vera vælkomin í handilsmiðstøðina og nýtir samstundis høvi at ynskja øllum Føroya fólki eini gleðilig jól.